# TILTØK

**Lívdin**
Samkoman Lívdin hevur familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti, kl. 12.00 hvønn sunnudag í Hoyvíkar skúla. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 20.00 Tey ungu og barna/ungdómsarbeiðarar samlast heima hjá Bernhard Petersen.
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti (eingin sunnudagsskúli), kl. 17.00 Familjumøti, drekkamuður aftaná. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 10.00 Møti, Absalon Áargarð talar
Mánadagin kl. 18.30 Hugnaløta teirra ungu. Heimasíða: www.hebron.fo

**Rhema á Hálsi**
Møti og sunnudagsskúli verða sunnudagin kl. 17.00. Á møtinum verður videoupptøka víst á stórskíggja við kenda avangelistinum Jessi Duplantis úr USA. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Vónin og bíðitíðin. Kl. 11.00 Gudstænasta og kvøldmáltíð, J. V. Danielsen.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Hans Eiler Hammer.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 19.30 í KFUK: Adventsfest. Inngangur við Henning Nielsen, presti, Kristiliga sangkórið luttekur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.




**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn, kl. 20.00 Grøðingarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Sam Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mánadagin bønarmøti kl. 20.30.
Í kvøld kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ J-bólkinum hjá Sannu.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 After Eight.
Sunnudagin, kl. 11.00 Gudstænasta, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Kaldbak**
Missiónsvikan, sum skuldi verða í Kaldbak frá 28. nov til 1. des. 2002, verður flutt til **20. feb. til 23. feb. 2003.**

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evang. møti við fríum vitnisburði.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Dánjal á Dul Jacobsen, kl. 17.00 Barnamøti. Vælkomin í Kelduna, www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Hans K. Jóhannesen, ung syngja solo og framføra drama. Missiónsvikan heldur fram vikuna út.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 15.00 Adventshugni við drekkamunni. Eingin sunnudagsskúli á Kambsdali. Møti við teimum ungu er kl. 18.00 og ungdómsmøti kl. 21.00.

**Betania Skopun**
Leygardagin kl. 11.00 Barnamøti 3-6 ár. Kl. 14.00 Barnamøti 1.-3. fl., kl. 17.00 Barnamøti 4.-6.fl.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur. Kl. 18.00 Møti. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
*Missiónsmánaðurin í KFUM & K, Klaksvík, endar hetta vikuskiftið.*
Hóskvøldið 28. nov. kl. 20.00: Bíbliutími, 1. Korint. kap. 3 v/ Ámundi Berthelsen. Fríggjakvøldið 29. nov. kl. 19.30: Møti v/ Bergi Debes Joensen. Sangur: Kórið Effata av Strondum. Leygardagin 30. nov. kl. 10.00: Fyrilestur v/ Sólborg Dulavík. Evni: Hvussu møta vit menniskjum í truplari støðu – sum medmenniskju. Leygarkvøldið kl. 19.30: Møti v/ Marian Kass Nielsen. Sangur: Streingjakórið í KFUM & K. Sunnudagin 1. desember kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Marius Jacobsen. Sangur: Tabor-kórið av Toftum. Sunnukvøldið kl. 21.00: Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Møti, kl. 22.00 Ungdómskvøld.
Leygardagin kl. 13.00 Føðingardagshald fyri vaksin, kl. 17.00 fyri børn.
Sunnudagin kl. 9.30 Sangur og lovprísan, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 16.00 Møti í skúlanum á Fossanesi, kl. 20.00 Møti í skúlanum á Fossanesi.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Talarar til møtini: Olvheðin Jacobsen, Hjalgrím Davidsen, Annfinn Eliasen og Thomas J. Askham.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 30. nov. kl. 20.00, talari er Gordon Grieve úr Kanada. Mennirnir eru vælkomnir at vera við.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti við Eivinnd Bringsberg.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Gordon Grieve. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Hallur og Mourits. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Porkeris kirkja**
Talvan gongur sunnudagin fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20.00 í Fjallbrúður í Vági. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.

Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna familju- og barnagudstænastu, kl. 18.00 Møti.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti við Esther Johannesen og Malan Hentze.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.

**Jólahugni í Felagslonini**
í Fuglafirði verður fyri allar fólkapensjónistar við maka í Fuglafjarðar kommunu, týskvøldið 3. desember kl. 19.00.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Hevur jólahugna fyri limir við gesti í húsum felagsins mikukvøldið 4. des. kl. 19.00.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Jólasøla verður alla vikuna frá kl. 14–17.00 í kjallaranum. Inngongd frá Grasagarði**
*Mánadagin 25. nov.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv vit hugsa um jólini
**kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum**
*Týsdagin 26. nov.:*
kl. 10-12 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen
Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Sára Malena í Skúgvi (1832-1903)** Ólavur Clementsen
*Mikudagin 27. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum
*Hósdagin 28. nov.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-12 Virka til jóla
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum
*Fríggjadagin 29. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum
**kl. 16.30 Kvøldseta - Úr føroyska skaldaheiminum:** Søgur, frásagnir, sangir og yrkingar. Lesibólkurin í Havnar Sjónleikarfelag

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 8. desember verður gingið undir Vestmannasund. Byrjað verður kl. 14.00 (saman við Bragdinum) úr Leynum. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 13.00. Tilmelding í seinasta lagi 2. desember.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20–21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.



# FILMSTEIGURIN

## Skatteplaneten

Langt úti í luftahavinum, Æterium, liggur planetin Montressor. Her býr tann lítli Jim Hawkins saman við foreldrum sínum. Jim elskar sepnnandi ævintýr. Serliga dámar honum væl legenduna um tann viðgitna sjórænaran Kaptain Flint, sum fyri langari tíð síðani hevur heimsøkt Æterium og kapraði túsundavís av stóru skipum, sum hann rændi gull frá. Flint dukkaði altíð púra óvæntað upp og hvarv líka skjótt aftur, og eingin fann nakrantíð út av, hvussu hann bar seg at. Men slatrið segði, at Kaptain Flint savnaði allan sín ríkdóm á eini fjarari planet, sum síðani er vorðin kend sum Skattaplanetin. Eingin hevur tó nakrantíð funnið út av, hvar hon er.

Alt hetta er ógvuliga spennandi fyri lítla Jim, og hann ger av, at tá hann verður stórur, fer hann at finna Skattaplanetinum. Men mamma Jim, Sarah Hawkins, má skuffa hann. Søgan um Skattaplanetinum er bert eitt ævintýr.

So ganga 12 ár. Pápi Jim er farin frá konu og soni fyri fleiri árum síðani, og Sarah stríðir seg gjøgnum tilveruna við at dríva eina krógv, sum eitur Benbow. Jim er vorðin ein raskur drongur, men hann er villur og kemur altíð í stríð við lógina og endar ein dag við hóttanini um ungdómsfongsulsrevsing. Góði vinurin hjá familjuni, tann løgni astrofysikarin Dr. Delbert Doppler, vil fegin hjálpa Jim, men veit ikki rættuliga, hvussu hann skal bera seg at.

Ein vakran dag gongur eitt skip burtur nærindis krónni, og Jim bjargar tí einasta umborðverandi, sjórænaranum Billy Bones. Bones er álvarsliga skaddur, men áðrenn hann doyr, nær hann at ávara Jim »ímóti cyborgini«. Eingin skilir meiningina, men í viðførinum hjá Billy Bones finnir Jim eina lítla kúlu, sum hann klárar at taka við sær, áðrenn krógvin verður álopin av piratum, sum brenna krónna niður. Jim, mamma hansara og Dr. Doppler bjarga sær í evstu løtu…



## Hart's War

Bruce Willis og Colin Farrel eru høvuðsnøvnini í hesum filmi – ein morðthrillari, sum fer fram í eini týskari fangalegu undir 2. heimsbardaga.

Tommy Hart (Colin Farrell) er ein priviligeraður 3. árs juralesandi frá Yale, er takkað verði politisku ávirkanini hjá pápanum, alt ov lætt vorðin loytnantur og plaseraður sum adjudantur fyri ein obert undir síni luttøku í 2. heimsbardaga. Men undir pansaraslagnum við Ardennurnar gongur galið. Hart verður tikin sum krígsfangi og settur í eina týska fangalegu fyri amerikanskar, bretksar, franskar og russiskar fangar.

Hann leggur skjótt til merkis, at tann avgjørt ovastkommanderandi millum fangarnar er tann barski og einaráðandi oberturin, William McNamara (Bruce Willis). Tá tað ikki er pláss til fleiri í offiserbarakkini, verður Hart settur í eina aðra barakk – millum teir meinigu, har hansara tilvera skjótt skapar órógv. Støðan gerst enn verri, tá tveir offiserar afturat koma til leguna og verða settir í somu barakk. Tí tað eru tveir svartir pilotar, og teir fáa eina kaldliga móttøku, og rasistiskur mótvilji kennist beinanvegin frá hinum fangunum. Tá annar av teimum verður ákærdur fyri flugtroynd og beinanvegin avrættaður, og tá ein av hinum mælsku hvítu fangunum stutt eftir verður myrdur, verður hin svart fangin útpeikaður sum tann seki. Tað eydnast McNamara at sannføra kommandørin um, at fangarnir mugu gera sín egna dómstól og avgera sakina, og hann peikar út Hart sum verja fyri tann ákærda, sekundloytnant, Lincoln Scott …

## Monster's Ball



– Ein Oscarsvirðisløntur stórfilmur við Billy Bob Thornton og Halle Berry, sum Marc Forster hevur leikstjórnað. Í hjáleiklutunum eru fólk sum Peter Boyle, Heath Ledger og Sean Combs (Puff Daddy).

Ein svartur fangi (Sean Combs) verður avrættaður á deyðsgongini í statinum Georgia. Tann rasistiski fongsulsvørðurin, Hank (Billy Bob Thornton), sum hevur ábyrgdina av avrættingini, verður forelskaður í einkju, Leticia (Halle Berry). Teirra felags persónliga tragedia verður støðið undir eini hending, sum fyri Hank førir til eina uppgerð við teir normar og tey virði, sum hava verið ráðandi í lívi hansara.

Monster's Ball er ein dramatisk kærleikssøga, sum snýr seg um sosialan arv, rasismu, fyrigeving og desperatan kærleika.





**Heimsfrumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 29.11. | kl. 16[00] | Fríggjadagin | 29.11. | kl. 17[00] |
| Leygardagin | 30.11. | kl. 16[00] | Leygardagin | 30.11. | kl. 17[00] |
| Sunnudagin | 01.12. | kl. 16[00] | Sunnudagin | 01.12. | kl. 18[30] |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 29.11. | kl. 19[00] | Fríggjadagin | 29.11. | kl. 22[30] |
| Leygardagin | 30.11. | kl. 19[00] | Leygardagin | 30.11. | kl. 22[30] |
| Sunnudagin | 01.12. | kl. 18[00] | Sunnudagin | 01.12. | kl. 21[30] |




**Frumsýning**
Fríggjadagin 29.11. kl. 23[30] Leygardagin 30.11. kl. 23[30]
Sunnudagin 01.12. kl. 23[00]




**Frumsýning**
Fríggjadagin 29.11. kl. 21[00] Leygardagin 30.11. kl. 21[00]
Sunnudagin 01.12. kl. 20[30]




Fríggjadagin 29.11. kl. 18[30] Leygardagin 30.11. kl. 18[30]
Sunnudagin 01.12. kl. 16[15] – *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning – Forsølan er byrjað**
Mikudagin 18.12. kl. 18[30] Mikudagin 18.12. kl. 22[15]